# Mótmæla hvalaveiði

25 lond fyrireika seg nú til at senda íslendsku stjórnini eitt formligt mótmæli ímóti, at íslendingar aftur eru farnir undir vinnuliga stórhvalaveiði. Frakland er eitt av londunum, sum fer at mótmæla, og talsmaðurein hjá uttanríkisráðnum í París, Jean-Baptiste Mattei, segði í gjár, at londini fara at biðja íslendsku stjórnina endurskoða sína avgerð. Fleiri lond hava mótmælt íslendsku avgerðini, men Noreg, Japan og onnur lond stuðla henni.



# Vindur og kavi

Tað var illveður í Danmark, Noregi og Svøríki í gjár og í nátt. Í Noregi var stormur á Vesturlandinum, og nógvastaðni kom so nógvur kavi niður, at ferðslan steðgaði. Í Svøríki kavaði eisini so illa, at fleiri tok stóðu still, og nógvir bilar kavaðu inni. Á motorvegnum sunnan fyri Stockholm noyddust 400 fólk at sova í bili í nátt. Í Danmark var nógvur høgættarvindur, og tað gjørdi, at brúgvin um Stórabelti mátti latast aftur.

# Grátt økið innan lýsingarmarknaðin

**Lýsingar um spøl, har til ber at vinna – og tapa – pening, gerast alt fleiri í Føroyum. Enn hevur ákæruvaldið ikki tikið støðu til, hvørt talan er um lógligar lýsingar ella ikki**

MARKNAÐARFØRING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Tvey dømi um lýsingar, sum beinleiðis vísa til spæl við pengum, hava verið at sæð í Føroyum seinasta mánaðin*
*Mynd:Álvur Haraldsen*

Seinastu tíðina hava lýsingar frá veddingarfyritøkum verið at sæð í Føroyum. Eitt nú var hetta sjónligt, tá fótbóltslandsliðið spældi heimadyst móti Litava. Tá var partur av bandalýsingunum frá útlendskum bookmakara, sum skipar fyri fótbóltsvedding. Og í Dimmalætting í gjár var lýsing frá Mermaid-Poker, har boðið var til FM-kapping í poker. Ein kapping, har buy-in er á $ 10, og har talan altso er um spæl við peningi.

## Greiðar reglur hjá grannunum

Í grannalondum okkara eru greiðar reglur um, hvørjar lýsingar eru loyvdar og ikki. Og hóast ES hevur roynt at gera sína ávirkan galdandi, so er reglan enn, at tað bert eru almennu spælifeløgini, t.d. Danske Spil, sum hava loyvi at lýsa við sínum vørum.

Tað hevur við sær, at tað í dag ikki ber til at síggja lýsingar frá eitt nú stóru ensku veddingarfyritøkunum í donskum miðlum. Og einasti møguleiki hjá hesum at snúgva sær er, við at hava eitt nú sjónvarpsrásir við heimstaðið uttanlands. Eitt modell, sum bæði TvDanmark og Viasat hava nýtt.

Dømi um sakarmál hava verið fleiri. Eitt nú eru fleiri útlendskir bookmakarar stevndir í Danmark fyri brot á lýsingarlóggávuna, og í Noreg varð Maradona skuldsettur, tá hann her fyri var á fótbóltsrundferð. Sum lýsing á spælarabúnanum hevði Maradona nevnliga búmerki hjá PartyPoker.

Við øðrum orðum, so forbjóða lógirnar øllum lýsingum – undantikið teimum almennu – um spæl. Eisini hóast útbjóðarin virkar á útlendskum marknaði.

## Ógreiðar reglur

Her í Føroyum er ákæruvaldið tó í iva um, hvørjar reglur eru galdandi á økinum.

– Tað er sjálvandi eitt øki, har vit fylgja væl við, hvat hendir, men tað er ógreitt, hvat lógargrundarlag vit hava at virka á, sigur Finn Ougaard, varafúti.

– Vit hava eina lóg um ítróttarvedding, sum staðfestir ein einkarrætt at skipa fyri spæli innan hetta økið. Og í revsilógini er staðfest, at hasard-spæl og medvirkan til hetta er ólóglig. Tí er spurningurin einamest, hvørt nevndu lýsingar koma undir hetta økið ella ikki, og tað fái eg illa gjørt ítøkiligar viðmerkingar til. Eisini tí talan er um útlendskan útbjóðara, sum fyriskipar spæl uttan fyri føroysku landoddarnar.

– Tað einasta, sum eg fái sagt, er, at vit fylgja gongdini á økinum neyvt. Okkara skylda er eisini at meta um slík viðurskifti, tí er talan um revsiverd forhold, so skulu málini takast upp, sigur hann.

# Thor Sentry ringan brotasjógv

**Men siglur nú við egnari megi móti Eggertsundleiðini. Fimm mans eru við og tveir teirra eru føroyingar. Eingin hevur fingið skaða.**

BROTASJÓGVUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



Fýra rútar brotnaðu, og øll navigatiónsútgerðin varð oyðiløgd, tá føroyski standbybáturin Thor Sentry varð raktur av einum herviligum brotasjógvi seinnapartin í gjár. Skipið varð tá stætt umleið 200 km. í ein útnyrðing úr Stavanger, miðskeiðis millum Stavanger og Orknoyggjar, har tað hevði arbeiðsuppgávu við eina oljuleiðing. Tað var kl 16:20 føroyska tíð, at manningin á Thor Sentry sendi út neyðarkall, tá ein sera stórur sjógvur hevði brotið rútar á brúnni. Orkan var í økinum, og aldurnar vóru millum 15 og 20 metrar høgar.

Fimm mans eru við skipinum, tveir føroyingar og tríggir bulgarar. Føroyingarnir eru skipari og stýrimaður. Sambart reiðarínum var ein teirra á brúnni, tá sjógvurin rakti brúnna, men eingin mannskaði hendi. Skipið mist alt radiosamband.

Gunnbjørn Joensen, stjóri hjá Thor sigur, at skipið varð ongantið í havsneyð, tó at brotasjógvurin var av tí ringasta. Manningin hevði alla tíðina tamarhaldið á støðuni, tó at róðurið ikki riggaði sum tað skuldi. Annað skip hevur ligið hjá Thor Sentry, um tað fór at verða neyðugt at taka manningina av skipinum. Tað gjørdist ikki neyðugt, heldur ikki at senda bjargingartyrlu avstað. Veðrið batnaði so við og við, og í morgun er veðrið væl betri og skipið hevur sett kósina móti Eggertsundleiðini. Tað siglur sjálvt. Helst verður seinni siglt til Hanstholm.

Tað er Thor í Hósvík, sum eigur trolaran Thor Sentry.

## FAKTA UM THOR SENTRY

Skipið er bygt á Ulstein Verft í 1961
Fyrrverandi nøvn:
2002 – 2005: Suðurvarði
1976 – 2002: Jonrit
1970 – 1976. Gracie
1961 – 1970: Tummas við Kráir